


www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 09 - 2011

# Cairn framvegis góðar vónir um Grønland

Hóast skotska oljufelagið Cairn Energy ikki hevur fingið nakað burtur úr leitiboringunum í Vesturgrønlandi enn, er felagið sannført um, at tað var rætt at gera íløgur í leiting við Grønland. Tað staðfestir formaðurin, Bill Gammel, í hálvársroknskapinum, sum júst er almannakunngjørdur. Skotska felagið hevur leitiloyvi í 11 blokkum upp á tilsamans 102.000 ferkilometrar. Feagið sigur, at hóast boringarnar higartil ikki hava givið tað ætlaða úrslitið, hava tær útvegað felagnum nógva vitan, sum skal brúkast í komandi oljuleiting. Fleiri útskiftingar eru hendar í leiðsluni í Cairn Energy í seinastuni, og tað verður eisini umrøtt í hálvársroknskapinum. Bill Gammel er vorðin nevndarformaður ístaðin fyri Norman Murray, og Simon Thomson er vorðin aðalstjóri. Hann hevur havt ein avgerandi lut í virksemi felagsins í Grønlandi og í India. Cairn Energy hevur gjørt íløgur fyri milliardir í leiting í grønlendskum øki. Tann fyrsta boriroyndin, sum var í fjør, gav einki, og fyri stuttum boðaði felagið frá, at ein boring, sum júst er liðug, gav heldur einki. Felagið leggur tó dent á, at tað er framvegis av teirri áskoðan, at tær jarðfrøðiligu fyritreytirnar fyri einum góðum úrsliti eru til staðar í Grønlandi.